# Gullmanningin frá 2001 savnað aftur

**Havnarbáturin ætlar at byrja á sløttum borði í ár, og gera alt fyri, at FM-heitið aftur kemur til høvuðstaðin**

KAPPRÓÐUR
*Páll Holm Johannesen*



*FM-rúsur á ólavsøku fyri tveimum árum síðan. Stendur tað til manningina á Havnarbátinum, so verður FM-rúsurin endurtikin á ólavsøku í ár.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Stóri taparin í ólavsøkuróðrinum í fjør var uttan iva Havnarbáturin. Tá, ið tað restaðu hundrað metrar í róðrinum hjá 10-mannaførinum á ólavsøku, lá Havnarbáturin til at vinna FM-heitið.

Eysturoyingur setti tá endaspurtin inn, og bátarnir lógu stavn um stavn inn eftir molanum, men Eysturoyingur varð drúgvastur, og vann harvið FM-heitið í 10-mannaførum.

Av tí, at Vestmenningur vann ólavsøkuróðurin frammanfyri Eysturoying og Havnarbátin, endaði Havnarbáturin heilt afturi á triðja plássinum í samlaðu FM-støðuni í fjør.

Í ár ætla havnarmenn at taka sær um reiggj. Gullmanningin frá kappróðrarárinum 2001 er so at siga savnað aftur, og longu nú verður nógv lagt fyri í venjingunum.

Nakrir av manningini á Havnarbátinum í 2001 valdu í fjør at taka ein steðg frá kappróðri, men hava valt at rógva aftur í ár.

Venjingin byrjaði 6. januar, og í løtuni verður vant tríggjar ferðir um vikuna. Øll venjingin er á landi, har dentur er lagdur á tí kropsligu venjingina. Hon fevnir um renning, styrkivenjing og innandura rógving.

Hóast fleiri mánaðir eru til fyrstu stevnuna, so siga teir á Havnarbátinum seg gleða seg til kappróðrarárið. Teir ætla at byrja á sløttum borði í ár, og gera alt fyri at FM-heitið aftur kemur til Havnar.

**Fakta**

**Manningin á Havnarbátinum í ár**

Jógvan Jacobsen
Regin Johannesen
Búgvi Poulsen
Marius Joensen
Magni Brøðraberg
Jens Kristian Dam
Mayfinn Norðoy
Ingi av Tórgarði
Jón Rosenblad
Ragnar við Streym
Jógvan Lutzen

# Kappingin um triðja plássið harðnar

**Stjørnan liggur í løtuni best fyri í kappingini um bronsuheiðursmerkini**

HONDBÓLTUR
*Páll Holm Johannesen*

Ein dystur verður í kvinnudeildini í kvøld. Í høllini í Klaksvík fær Stjørnan vitjan av STÍF. Í grundspælinum vann Stjørnan báðar dystirnar ímóti strandakvinnum, og er favorittur undan dystinum í kvøld.

Stjørnan liggur í løtuni á triðja plássi, fimm stig eftir VÌF, men hevur leikt tveir dystir minni. Skulu klaksvíkskvinnur ota seg longri upp eftir stigatalvuni, skulu tær vinna dystin í kvøld.

Kappingin um heiðursmerki í kvinnudeildini er tøtt í ár. Í løtuni røkist nógv fyri, at vágskvinnur fara at gerast drúgvar í kappingini um FM-heitið. VÍF tykist í løtuni vera einasta liðið, ið veruliga kann hótta VB.

Fleiri lið kappast um triðja plássið, og í tí kappingini liggur Stjørnan best fyri í løtuni. Kyndil, Neistin og STÍF liggja í hølinum á Stjørnuni, og skuldi Stjørnan snáva, hava øll liðini møguleika at styrkja sær støðuna í kappingini um bronsu-heiðursmerkini.

STÍF hevur møguleikan í kvøld at taka eitt stig ímóti einum møguligum heiðursmerkjaplássi, men so er kravið ein sigur í trupla útidystinum ímóti Stjørnuni.

Strandakvinnur hava ikki staðið seg so væl í endaspælinum higartil, og enn er bert eitt stig komið til høldar. Um tað STÍF skal fáa fulla úrtøku í kvøld, so er líkt til, at nógv má leggjast á herðarnar hjá stórskjúttanum Asta Petrauskiene.



*Kappingin um bronsu-heiðursmerkini harðnar. Tveir av kappingarneytunum, Stjørnan og STÍF, bresta saman í kvøld í Klaksvík*

# Aftur stórt hall hjá FSF

**Fótbóltssambandið hevði í fjør eitt hall upp á 1,24 mió.kr. Var tað ikki fyri yvirtøkuna av bygninginum við Tórsvøll og tilhoyrandi stuðulskrónum, hevði FSF verið insolvent við ársskiftið**

FÓTBÓLTSPENGAR
*Jákup Mørk*

Tá Fótbóltssambandið fer at hava aðalfund leygardagin, er framløga av ársroknskapinum sjálvandi eitt av føstu punktunum á skránni.

Og eins og undanfarin ár, so eru tað alt annað enn vøkur tøl, sum verða løgd fram fyri aðalfundin. Niðasta talið á botnlinjuni fyri 2002 er eitt minus upp á 1.242.307 kr., og tó at hetta er 300 tkr. frægari enn fyri í fjør, so er tað einki dulsmál, at hetta ikki er nakað, sum FSF kann liva við í longdini.

Tað er tó neyvan so, at tilverugrundaralagið hjá Fótbóltssambandinum er hótt av úrslitinum. Í inniverandi ári kann í øllum førum roknast við munandi øking á inntøkusíðuni. Ein øking, sum einamest stavar frá lutakastinum í EM-bólkinum, har vit jú komu í bólk saman við Týsklandi. Eitt lutakast, sum sambært táverandi formanninum, Torleif Sigurðsson, mundi vera einar 8 mió.kr. vert.

### Tórsvøllur bjargaði eginognini

Við árslok 2002 var eginpeningurin hjá FSF 5.466 tkr. Eginpeningurin er tann munur, sum er ímillum ogn og skuld hjá felagsskapinum, og í so máta stendur helst heilt væl til.

Tað er tó vert at bíta merki í, at einasta orsøkin til, at eginpeningurin hjá FSF er positivur, er, at feløgini á aðalfundinum í fjør samtyktu, at Fótbóltssambandið skuldi yvirtaka bygningin við Tórsvøll. Ein yvirtøka, sum gav FSF rætt til studning frá FIFA upp á 4.562 tkr., umframt at Tórshavnar Býráð seinni hevur latið eina millión í stuðuli til liðugtgerðina av bygninginum. Var tað ikki fyri hesar stuðulsupphæddir, sum eru bókaðar beinleiðis inn á eginognina, hevði FSF við verandi aktivitetsstøði havt negativan eginpening við árslok, og vildi sostatt verið insolvent.

Og so kann eisini nevnast, at stuðulsupphæddirnar ikki hava verið nakað, sum hevur havt beinleiðis ávirkan á pengakassan hjá Fótbóltssambandinum. Hesar upphæddir eru nevnliga fluttar víðari alt fyri eitt. Kassakreditturin hjá Fótbóltssambandinum er framvegis trektur við nærum trimum milliónum krónum, og bara í rentum kostar hetta FSF – og harvið føroysku fótbóltsfeløgunum – 250 tkr. um árið.



JAVNI

## Økisfundir

**„Smábarnafamiljur“ við børnum við menningartarni og serligum tørvi**

Javni bjóðar til almennar fundir í komandi viku. Á teimum ymsu fundunum fara foreldur og onnur serkøn fólk at viðgera støðuna hjá familjuni, tá eitt barn hevur brek. Hvussu verður brekið fylgt upp? Hvørji tilboð hava almanna- og heilsuverkið? Tað hevur stóran týdning, at barnið fær rættu viðgerðina til rætta tíð. Við hesum heita vit á foreldur, serkøn og politisku myndugleikarnar at koma at lurta og taka lut í kjakinum.

**Klaksvík: Sjómansheimið mánakvøldið 24. februar kl 19.30.**
Við pallborðið sita Sigbritt Hansen, mamma til smádrong við breki, Ingrid Hayfield, mamma til drong við Down Syndrom, Doris Heinesen, heilsusystir, umboð frá Klaksvíkar Sjúkrahúsi og kommunulæknunum.

**Fuglafjørður: Mentanarhúsið mánakvøldið 24. februar kl 19.00.**
Við pallborðið siga Gudný og Birgir Samuelsen, foreldur til smádrong við breki, Julianna Næs, pedagogur í barnagarði, Marjun Thomassen, fyrioterapeutur, Kári Rasmussen, kommunulækni, Karin á Heygum, serráðgevi á Almannastovuni og Bill Justinussen, landsstýrismaður.

**Tórshavn: Hotel Hafnia mánakvøldið 24. februar kl 19.00.**
Við pallborðið sita Lone Húsgarð, mamma til smádrong við autismu, Bogi Andreassen, pápi drong við Down Syndrom, Johanna Hansen, leiðari á sambýli í Klaksvík og Petra Joensen frá brektoyminum á Almannastovuni.

**Miðvágur: Bygdarhúsið týskvøldið 24. februar kl 19.30.**
Við pallborðið sita Marjun í Kálvalíð, mamma smádrong við breki, Ragnhild Dahl, serráðgevi, Marjus Dam, kommunulækni og umboð fyri starvsfólk.

**Vágur: Hotel Bakkin mánakvøldið 24. februar kl 19.30.**
Við pallborðið sita Eileen Michelsen, ljósmóður, Sirið Stenberg, heilsusystir, Birita Jacobsen, leiðari á Mýrufípuni og John Mortensen, sosialráðgevi.

Øll eru vælkomin.

**Økisnevndirnar og starvsnevndin**

HOTEL VÁGAR *** THE AIRPORT HOTEL

Hygg her!

mánadag - hósdag frá kl. 11.00 - 21.00
fríggjadag - leygardag frá kl. 11.00 - 15.00

AIRPORT STEAK

við kipsi og persillusmøri ella bearnaisesós og broysknum salati

bara 68,-

HOTEL VÁGAR
FLOGFELAG FØROYA
SØRVÁGUR
TEL 33 29 55 · FAX 33 23 10 · T-Postur: hotel@ff.fo

Føroya Fólkaháskúli - Háskúlavegur 14 - FO 100 Tórshavn
Telefon 311743 - Telefax 319687 - Teldupost: ffh@skulin.fo

## Sjónleikaraskeið á Háskúlanum

*Kroppurin sum vegvísari*

Tema: **Í staðin fyri at kroppurin stendur í vegin - vísir hann tær vegin**

Arbeitt verður við improvisatión og grundleggjandi rørsluvenjingum, sum m.a. umfata dans. Møguliga verður eisini arbeitt við tekstabrotum.

Skeiðið er leygardagar frá 22. mars til 3. mai millum kl. 12 og 15 og vendir sær til øll yvir 17 ár.

**18 skeiðstímar íalt**

Skeiðkostnaður er kr. 600,-
Undirvísari: Bárður Persson (506289) úr Leikarafelag Føroya

**Tilmelding hjá Føroya Fólkaháskúla á tlf. 311743**
**ella teldupost: ffh@skulin.fo**

## Aðalfundur

Fráboðaði aðalfundur Føroya Arbeiðarafelags verður fríggjadagin og leygardagin 14. og 15. mars 2003 í hølum felagsins.

Uppskot til fundin skulu verða skrivstovu felagsins skrivliga í hendi í seinasta lagi hósdagin 24. februar 2003.

Seinasta freist fyri tilmelding til aðalfundin og innivist er 24. februar 2003.

**Føroya Arbeiðarafelag**
tlf. 312101 – faks 315374

Internet
Sosialurin
www.sosialurin.fo

Lesið Sosialin

## Frá Vága Javnaðarfelag

Aðalfundurin er útsettur fyribils.

**Nevndin**

## Eigaraskifti í IGLOO og sp/f Tráður

**Leygardagin 22. februar 2003** er seinasti dagur tógvhandilin IGLOO er opin við núverandi eigara og samstundis letur heilsølan undir sp/f Tráður aftur.

Leygardagin 1. mars 2003 lata handilin og heilsølan uppaftur í somu hølum við nýggja eigaranum Annfinni Norðfoss.

Vit nýta samstundis høvi til at takka okkara viðskiftafólki um alt landið fyri dyggan stuðul og gott samstarv øll hesi árini.

Eisini fara vit at ynskja nýggju eigarunum góða eydnu við handilinum og heilsøluni við ynski um at viðskiftafólkini fara at stuðla nýggja eigaranum eins væl.

Vegna
**Tógvhandilin IGLOO og sp/f Tráður**
Marita Thorsteinssin og Thordur Thorsteinsson